Bussleiðin 25 ár:

# Ókeypis karamellur í býbussunum




*Ein av fyrstu Volvo VBK bussunum í Steinatúni. Havnarborgarar tóku væl ímóti bussleiðini*

**8. juli 1979 byrjaði tann regluliga koyringin hjá Bussleiðini í Havn. Í sambandi við 25 ára føðingardagin hjá Bussleiðini, bjóðar býráðið karamellur til tey ferðandi í býbussunum í dag**

BUSSKOYRING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tey sum ynskja sær ókeypis karamellur hósdagin kunnu fara ein túr við Bussleiðini í Havn, tí tá hevur Bussleiðin 25 ára føðingardag, og Tórshavnar býráð bjóðar ókeypis Quality Street karamellur.

Tað var tann 8. juli 1979 at regluliga koyringin hjá Bussleiðini í Havn byrjaði.

Tórshavnar býráð keypti tríggjar Volvo VBK bussar til endamálið. P/F Bil rak hesar bussar fyri býráðið tey fyrstu árini. Táverandi býarverkfrøðingurin, Vøgg Guttesen, hevði ábyrgd av bussleiðini.

Býurin var ikki so stórur tá. Til dømis koyrdu bussarnir bert nakað niðan eftir Sundsvegnum, teir vendu, har sum vegurin snarar inn á Vegin Langa. Koyrandi var ikki millum Sundsvegin og Vegin Langa.

Í 1983 bleiv Bussleiðin umskipað soleiðis, at fýra busseigarar áttu og róku hvør sínar tveir býbussar, teir vóru: Arni Berg, Gunleif Danielsen, Sámal Bláhamar og Mourits Mouritsen. Allir høvdu teir sáttmála við býráðið.

Síðan 1. februar 2003 hevur Mourits Mouritsen átt og rikið allar býbussarnar í Havn

Gundur Johannesen í Kollafirði hevur rikið Bussleiðina millum Havnina og Kollafjørð síðan januar 2001.

Busskoyring í Havn er annars ikki nakað nýtt fyribrigdi. Fyri 60 árum síðan, í 1944, byrjaði Óli Arge við skipaðari busskoyring millum miðbýin, hospitalið, og Sanatoriið í Hoydølum. Eisini aðrir hava roynt seg við privatari busskoyring í Havn.



*Hildebrand Midjord, bussførari, er tann sum hevur koyrt longst hjá Bussleiðini í Havn. Hann byrjaði 1. juli 1980, tá P/F Bil rak bussarnar fyri Tórshavnar býráð, og síðan hevur hann koyrt hjá Mourits Mouritsen, 24 ár tilsamans*


ONNIBUSS-koyring.

Koyrt verður til:

| | |
|---|---|
| Sanatoriið | kl. 9.45, 11.00, 3.30, 4.45, 7.00. |
| Hospitalið | kl. 2.45, 3.50. |
| Sundsbrúnna | kl. 5.30. |
| Argjar | kl. 7.30, 2.00. |

OLE ARGE

*Lýsing hjá Ole Arge í 1944. Fyrsta skipaða busskoyringin í Havn*




*Í juni 1979 komu teir tríggir fyrstu býbussarnir til landið og 8. juli byrjaði regluliga koyringin hjá Bussleiðini í Havn. Ein av hesum bussunum koyrdi í yvir 20 ár sum býbussur - tey seinnu árini sum eykabussur*

*Mynd: Myndaárbókin - árið ið fór 1979*



## UTTAN ÚR HEIMI





*John Kerry og John Edwards hava sett sær fyri at fella George W. Bush og Dick Cheney í heyst*

*Myndir: Reuters*

# Hann kann gera mun

**Tann 51 ára gamli John Edwards kann vísa seg at vera tað rætta valið hjá John Kerry á amerikanska forsetavalinum í heyst**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey flestu mundu vænta tað. John Edwards verður varaforsetaevni hjá demokratinum John Kerry á forsetavalinum í USA í heyst.

Tann 51 ára gamli senatorurin og ríkmaðurin úr Norður Karolina hevur verið senatorur síðani 1998. Hann er kendur sum ein sera góður røðari og hevur lætt við at tosa við tíðindafólk.

Áðrenn hann fór upp í politikk, arbeiddi John Edwards sum sakførari í heimstatinum Norður Karolina. Men tá hann í 1996 misti sín elsta son í einari ferðsluvanlukku, gjørdi hann av at gevast við sakførarayrkinum og at fara upp í politikk ístaðin fyri. Tvey ár seinni varð hann valdur í Senatið.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at John Edwards kann gerast munurin á forsetavalinum í heyst. Tað eru tey, sum siga, at John Kerry bliknar undir liðini hjá John Edwards. Sjálvur roynir Edwards at sannføra amerikanararnar um, at teir eiga at velja Kerry heldur enn Bush í heyst.

– John Kerry hevur alt, sum einum amerikonskum forseta tørvar, og eg fari at gera alt, fyri at hann verður okkara næsti forseti. Tí biðið eg tykkum hjálpa mær í hesum stríðnum, segði John Edwards, eftir at hann var vorðin tilnevndur varaforsetaevni.

# Gera film um týska mannaátaran

**Nógvir týskarar eru í øðini, tí ein filmur um mannaátaran Armin Meiwes hevur fingið almennan stuðul**

MANNAÁT
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri einum lítlum hálvum ári síðani fekk týskarin Armin Meiwes átta ára fongsul fyri at hava dripið og etið ein mann, sum hann var komin í samband við ígjøgnum alnótina. Í rættinum vísti tann ákærdi eina sjónbandsupptøku, sum hann sjálvur hevði gjørt av tilburðinum.

Nú hevur filmsmaðurin Rosa von Praunheim gjørt av at gera ein film um Armin Meiwes. Filmurin hevur fingið heitið "Títt hjarta í mínum heila", og upptøkurnar byrja í desember. Nógvir týskarar eru harðliga ímóti ætlanini, og mong eru í øðini um, at myndugleikarnir hava latið filmvkvinnuni 150.000 krónur í stuðuli til at gera filmin.

Rosa von Praunheim, sum hevur gjørt umleið 50 filmar, letur seg ikki ávirka av atfinningunum.

– Hvussu ofta siga vit ikki, at "eg eri so góður við teg, at eg kundi etið teg", sigur hann við tíðindastovuna Reuters.

### CIA duldi upplýsingar

Longu undan krígnum í Irak fekk amerikanska fregnartænastan at vita, at irakar høvdu eingi hópoyðingarvápn, og at landið var givið við royndunum at gera slík vápn. Men CIA valdi kortini ikki at geva George W. Bush, forseta upplýsingarnar.

Hetta kom fram undir avhoyringum í Senatinum herfyri, skrivar The New York Times. Ein nevnd hjá Senatinum hevur kannað umstøðurnar undan krígnum í Irak. Hon fer at almannakunngera eina frágreiðing seinni í vikuni, og sum skilst fer nevndin at finnast hvassliga at leiklutinum hjá CIA. Talsmenn hjá CIA verja seg við at siga, at fregnartænastan helt ikki upplýsingarnar úrt Irak vera serliga sannførandi.

George Tenet, sum fór úr stjórastarvinum í CIA fyri einum mánað síðani, sleppur heldur ikki undan atfinningum í frágreiðingini hjá senatsnevndini, skrivar The New York Times.

### Fleiri skip steðgað

Síðani tann 1. juli hava amerikanskir myndugleikar noktað 19 útlendskum skipum at koma í havn í USA.

Tær nýggju altjóða trygdarreglurnar, sum skulu forða yvirgangi, og sum umfata skip og havnir, komu í gildi tann 1. juli. Amerikanska sjóverjan sigur, at tey 19 skipini sluppu ikki í havn, tí tey luku ikki treytirnar í teimum nýggju reglunum. Samstundis verður upplýst, at 30 onnur útlendsk skip, sum lógu í amerikonskum havnum tann 1. juli, eru ikki sloppin útaftur, tí tey luku ikki trygdarreglurnar. Einki verður sagt um, hvørjum londum skipini eru úr.

147 lond hava staðfest tær nýggju trygdarreglurnar ímóti yvirgangi. Í reglunum stendur millum annað, at allar havnir og øll skip oman fyri 500 tons skulu hava reglur um, hvussu tey skulu verja seg ímóti yvirgangi.

### Koyra alt ov skjótt

Nógv teir flestu bilførararnir í Danmark halda seg niðan fyri hámarksferðina á vegunum, men kortini eru tað nøkur, sum hava ilt við at lætta fótinum av speedaranum.

Herfyri samtyktu politikararnir, at tey, sum koyra ov skjótt, skulu revsast harðari enn fyrr, men sambært løgregluni eru tað nøkur, sum ikki lata seg ávirka av tí. Asger Kristensen hjá ferðsluløgregluni sigur við Jyllandspostin, at í mai og juni steðgaði løgreglan 210 bilførarum, sum koyrdu so skjótt, at teir mugu til koyriroynd av nýggjum. Á Ráðnum fyri Ferðslutrygd vænta tey, at ímillum 1200 og 1500 danir fara at missa koyrikortið í ár, tí teir koyra ov skjótt.

Í einum átaki í mai og juni tók løgreglan 134 bilførarar, sum koyrdu meiri enn 160 kilometrar um tíman, hóast teir bert høvdu loyvi at koyra í mesta lagi 130 kilometrar um tíman. Á teinum, har hámarksferðin er 110 kilometrar um tíman, tók løgreglan 76 bilførarar, sum koyrdu meiri enn 160.

### Blað bað um umbering

Týsdagin brúkti amerikanska blaðið The New York Post alla forsíðuna til at siga frá, at demokratiska forsetavalevnið, John Kerry, hevði gjørt av at velja sær Dick Gephardt til varaforsetaevni. Á forsíðuni var eisini ein mynd, har teir báðir tosaðu saman.

Men nakrar fáar tímar eftir at blaðið var komið út, kunngjørdi John Kerry, at hann hevði valt sær senatorin John Edwards til varaforsetaevni. Blaðstjórin á The New York Post, Col Allan, sigur við tíðindastovuna AP, at blaðið helt seg hava fingið álítandi upplýsingar um, at Kerry fór at velja Gephardt, men at hetta tíverri vísti seg at vera ósatt. Vit hava tí ikki annað í at velja enn at biðja lesarar okkara um umbering, sigur Col Allan.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at The New York Post mistekur seg. Í oktober í fjør fanst blaðið hvassliga at kurvabóltliðnum New York Yankees, tí tað hevði tapt ein dyst kvøldið fyri. Trupulleikin var, at liðið tapti ikki.